# Nýggj lestrabók við prestum úr Norðoyggjum



Tær tríggjar døtrarnar hjá Rólandi Waag Høgnesen fingu fyrstu eintøkini av bókini

Mynd: Bárður Lydersen

Mikudagin kom ein nýggj lestarbók út. Tað er ein bók, sum Róland Waag Høgnesen, sáli, hevur lagt til rættis.

Bókin varð løgd fram á eini samkomu í Býráðshøllini í Klaksvík, har fitt av fólki var samankomið. Hátíðardámurin fornoktaði seg ikki, og millum gestirnar vóru bæði prestar, vinnulívsmenn, politikarar og onnur.

Róland Waag Høgnesen, sum var útiseti stóran part av ævi síni, fekk hugskotið til nýggju lestrabókina fyri nøkrum árum síðani.

Í formælinum greiðir hann frá, at hann vaknaði úr dreymi, meðan hann var staddur á Norðskála. Hann hevði droymt, at hann var komin væl ávegis við eini lestrabók.

Hann skúgvaði í fyrstu syftu tankan frá sær, men hann vitjaði javnan aftur. Tað endaði tí við, at tankin varð gjørdur til veruleika.

### Prestar úr Norðoyggjum

Í lestrabókini, sum kallast »Teg um tala og æra«, eru prædikur hjá prestum, sum hava verið í starvi í Norðoyggjum seinastu fimmti árini. Lestrarnir eru til fyrra tekstarað.

Róland Waag Høgnesen savnaði allar hesar lestrar, og tær prædikur, sum vóru hildnar á donskum, týddi hann til føroyskt.

Hóast hann gjørdist liðugur við handritið, upplivdi Róland ikki útgávudagin, tí í summar doyði hann bráðliga. Tá høvdu hann og bróðursonurin, Ólavur Waag Høgnesen, tosað um at fáa bókina út, og Ólavur hevði tikið á seg at fáa bókina til prentingar.

Ólavur hevur síðani – saman við fyritøkuni cre8 í Klaksvík – greitt bókina til prentingar, og mikudagin kom bókin so út. Á føðingardegnum hjá Rólandi.

### Gloymdi ikki upprunan

Á samkomuni í Býráðshøllini mikudagin hugleiddi Ólavur Waag Høgnesen um pápabeiggja sín og um arbeiðið við bókini. Jákup Reinert Hansen segði frá einum parti av søgunum um lestur, sum er serstøk í Føroyum, og nakrir sálmar vórðu sungnir.

Fyrstu eintøkini av bókini vórðu handað teimum trimum døtrunum hjá Rólandi Waag Høgnesen, sum eisini vóru til staðar. Tvær teirra búgva niðri, meðan tann triðja býr í Føroyum.

Abbasonurin Róland Waag Dam takkaði at enda vegna familjuna, og hann helt, at lestrabókin sýndi, at abbi hansara hevði ikki gloymt uppruna sín, hóast hann búði uttanlands stóran part av lívinum.

Nýggja lestrabókin fæst nú til keyps kring landið.



Ólavur Waag Høgnesen greiddi frá bókini hjá pápabeiggja sínum, sum ikki upplivdi útgávudagin av bókini hjá sær

Mynd: Bárður Lydersen



Stórur áhugi var fyri lestrabókini

Mynd: Bárður Lydersen



# Koma kanska at mangla grót til samferðsluhavnina í Trongisvági

**Har, sum loyvi er fingið at taka grót, er ikki nóg mikið og spurningurin er so, hvaðani restin skal koma frá**

SAMFERÐSLUHAVN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Í grótbrotinum er ikki nóg mikið av gróti uttan at taka hamaran omanfyri eisini upp í grótbrotið og tað hevði gjørt eitt sár í natúruna, sum er so grefligt, at tað er ein spurningur um tað kann góðtakast, heldur borgarstjórin á Tvøroyri*

Arbeiðið uppá at gera samferðsluhavnina í Trongisvági, kann nú koma í vanda.

Orsøkin er, at har, sum friðingarmyndugleikarnir hava givið loyvi til at taka grót til samferðsluhavnina, er ikki nóg mikið av grótið at fáa.

Og tískil hevur Tvøroyrar Kommuna ikki enn mist vónina um at fáa eitt samstarv í lag um at gera goymslutunlar omanfyri Drelnes.

Friðingarmyndugleikarnir hava givið loyvi til at taka grót úr einum grótbroti innaliga í Trongisvági, heilt inni við munnan til Hvalbiartunnilin.

Har er ein linja stungin út, sum grótið skal takast innanfyri.

Men harafturat fylgir tann treytin, at innanfyri tað ásettu linjuna, skulu ikki takast meiri enn 130.000 kubikk av gróti til samferðsluhavnina.

Landsverkfrøðingurin hevur áður sagt fyri Sosialinum, at tað er ikki nóg mikið til samferðsluhavnina og at tey tískil hava søkt friðingarmyndugleikarnar at strikað hámarkið fyri, hvussu nógv grót kann takast innanfyri hesa ávísu linjuna.

– Verður tað hámarkið strikað, er nóg mikið av gróti, segði Landsverkfrøðingurin, men enn hevur friðingarmyndugleikin ikki svarað.

Men hesum ivast borgarstjórin á Tvøroyri í.

Kristin Michelsen sigur, at Tvøroyrar Býráð hevur sera stóran áhuga í málinum.

Hann sigur, at tá ið arbeiðið varð boðið út, varð mett, at brúk vóru fyri 312.000 kubikkum av gróti til samferðsluhavnina

– Tí hava vit eisini kannað málið hjá serfrøðingum. Vit hava spurt tríggjar ymsar serfrøðingar og teir eru á einum máli um, at hóast alt verður sprongt burtur innanfyri ásettu linjuna, koma eini 150.000 - 200.000 kubikk av gróti at mangla í.

Borgarstjórin á Tvøroyri sigur, at skal nóg mikið av gróti fáast úr hesum sama grótbrotinum, verður tískil neyðugt at taka hamaran omanfyri eisini.

Og tað ivast hann í, at friðingarmyndugleikarnir fara at geva loyvi til, tí talan er um nattúruvakurt pláss og verður hamarin omanfyri eisini tikið, verður benið framvið vegnum ógvuliga grefligt.

Hann sigur, at Tvøroyrar Býráð tí ikki hevur slept møguleikanum at fáa byggifelagið at taka grót úr goymslutunlum á Drelnesi.

Hann skilur ikki, hví hesin møguleikin ikki verður tikin í álvara, tí kommunan hevur boðið sær til at betala meirkostnaðin av at taka grótið úr einum tunli, heldur enn úr einum grótbroti, samstundis sum hetta hevur stórar fyrimunir við sær fyri arbeiðið upp á samferðsluhavnina, tí koyring verður at kalla ongin og sostatt fara tær útreiðslurnar at gerast munandi minni.

# Ómetaliga stóran týdning hjá sjúklingum at fáa fylgjara við sær

**– Tá ið sjúklingar verða sendir uttanlands at fáa serviðgerð, hevur tað í nógvum førum sera stóran týdning at teir fáa fylgjara við sær, sigur fyristøðukvinnan á Suðuroyar Sjúkrahúsi**

SERVIÐGERÐ UTTANLANDS

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Fólk, sum eru sjúk, fáa oftani lítið við av tí, sum verður tosað við tey, tí tey eru so illa fyri sálarliga. Tí hevur tað stóran týdning, at tey hava onkran hjá sær, sum kann hjálpa teimum, sigur Thyra Thorsteinsson, fyristøðukvinna á Suðuroyar Sjúkrahúsi*

– Vit skulu verða ógvuliga varin at skerja møguleikarnar hjá sjúklingum, sum verða sendir uttanlands í viðgerð, at fáa fylgjara við sær.

Tað heldur Thyra Thorsteinsson, fyristøðukvinna á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Í Sosialinum í gjár fortaldi Bill Justinussen, landsstýrismaður í familju- og heilsumálum, at ætlanin er at seta eina nýggja kunngerð í gildi um, hvørjir sjúklingar kunnu hava fylgjara við sær, tá ið teir verða sendir uttanlands at fáa serviðgerð.

Eftir nýggju kunngerðini verður meginreglan tann, at vaksnir sjúklingar fáa ikki fylgjarar við sær. Higartil hava børn undir 16 ár havt rætt at fáa fylgjara við sær, men eftir nýggju kunngerðini verður aldursmarkið hækkað til 18 ár.

Tó kunnu undantøk gerast í serligum førum, so at eisini vaksin fólk kunnu fáa fylgjara við sær, tá ið tað verður mett at hava týdning fyri viðgerðina og somuleiðis kunnu børn í ávísum førum hava meiri enn ein fylgjara við, eitt nú bæði foreldrini.

Bill Justinussen sigur, at í nýggju kunngerðini verður meginreglan, at játtanin á fíggjarlógini til serviðgerð uttanlands, skal júst brúkast til serviðgerð og ikki til útreiðslur til ferðing og gisting hjá fylgjarum og fleiri ferðir hava røddir verið frammi um, at føroyingar hava serliga góðar sømdir at fáa fylgjara við sær og at tað viðhvørt hevur verið við at tikið yvirhond.

### Hevur sera stóran týdning

Ein av teimum, sum heldur, at vit skulu hugsa okkum ógvuliga væl um, áðrenn vit skerja møguleikarnar hjá sjúklingum at hava fylgjara við, tá ið teir verða sendir uttanlands at fáa serviðgerð, er Thyra Thorsteinsson, fyristøðukvinna á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

– Tað hevur í nógvum førum sera stóran týdning, at sjúklingar, sum verða sendir uttanlands, fáa fylgjara við, eisini vaksnir sjúklingar.

Hon heldur at tað ikki minst hevur týdning fyri sálarstøðuna hjá sjúklinginum, at onkur er við teimum, sum tey kenna og sum kann ganga teimum til handa og annars greiða alskyns viðurskifti fyri tey. Hon sigur, at sjúka førir ofta við sær, at sjúklingurin í veruleikanum ikki longur hevur tamarhald á støðuni, sum tey høvdu ímeðan tey vóru frísk og tí skal týdningurin av einum fylgjara ikki undirmetast.

– Sjúk fólk eru mangan illa fyri. Tey orka illa at hugsa og tað vísir seg ofta, at tey klára heldur ikki at miðsavna sínar tankar um tað, sum læknin greiðir teimum frá. Tað ber ikki til hjá teimum at savna hugan um tað, sum læknin fortelur teimum, so longu heilt stutt aftaná, minnast tey mangan lítið og onki aftur av tí, sum læknin hevur sagt.

– Tá er tað ógvuliga umráðandi, at tey hava onkran hjá sær, sum kann hjálpa teimum og sum kann minnast alt fyri tey.

Hon sigur, at hon hevur verið úti fyri, at vaksnir sjúklingar, sum Suðuroyar Sjúkrahús hevur sent til Danmarkar, hava ringt grátandi heim av flogvøllinum í Kastrup, tí tey vistu ikki, hvussu tey skuldu sleppa á Ríkissjúkrahúsið, hóast tað varð greitt teimum væl og virðiliga frá tí, áðrenn tey fóru og hóast tey søgdu, at tey høvdu skilt tað fult og heilt.

– Men veruleikin er, at sjúklingar fáa mangan lítið við av tí, sum verður tosað við tey og tí er tað í nógvum førum sera umráðandi at hava onkran við sær at hjálpa sær. Og tað, at vera um ein sjúkling, er mangan samdøgurs-sarbeiði.